Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Erhard Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum

Evni: Umvælingin av Hamragarði

Spurningar:

1. Hvat er støðan, viðvíkjandi umvælingini av Hamragarði í Vági?
2. Er semja ímillum Landsverk og eigararnar um, hvat ið skal gerðast?
3. Er endalig kostnaðarmeting gjørd av umvælingini?
4. Hvussu verður kostnaðurin býttur ímillum landið og eigararnar?
5. Nær kann roknast við, at arbeiðið byrjar og verður liðugt?

Viðmerkingar:

Stutt eftir at Hamragarður varð tikin í nýtslu gjørdist greitt, at týðandi brek vóru í bygninginum. Nú, 15 ár eftir, at Hamragarður varð tikin í nýtslu, er brekini enn ikki rættaði ella umvæld, til stóran ampa fyri bæði starvsfólk og brúkarar.

Tí verðar hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 24. februar 2026

Erhard Joensen